# Tey av Kamarinum í Sjónleikarhúsið

*Tann 4. og 5. februar fara tey av Kamarinum at spæla í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, men fyrst fara tey á pallin í Sjónleikarhúsinum nú leygarkvøldið. Bólkurin hevur í ár 45 ára stovningardag, tí hann sá dagsins ljós í 1955*



DAGFINN OLSEN

Nú leygarkvøldið fara Tey av Kamarinum á pall í Sjónleikarhúsinum.

Sum so er ikki nakað løgið í hesum, tí har hava tey mangan spælt áður. Men tó.

Hesaferð er tað stórur partur av upprunaligu manningini og harvið ein størri bólkur, enn vanligt er.

Eisini er bólkurin styrktur.

Hetta er komið í lag sum ein undanroynd til Danmarkarferðina hjá bólkinum. Tann 4. og 5. februar spæla Tey av Kamarinum nevniliga í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Tað er Nærvarpið í Keypmannahavn, sum hevur ynskt at hoyra upprunamanningina spæla og Nærvarpið skipar fyri.

**Upprunaligt og styrkt**

Men í morgin, leygarkvøldið, sleppur føroyska dansifjøldin at hoyra upprunabólkin, sum byrjaði í 1955, og tí ivaleyst er ein av elstu bólkum í landinum. Í ár kunnu tey halda 45 ára stovningardag.

Tey, ið fara á pallin leygarkvøldið, eru Nicolina Jacobsen, sang, Eyðbjørn Jakobsen, rútmuguitar og sang og Áslakkur Jakobsen, harmonika og sang. Hesi manna dagliga bólkin í dag. Ingolf Jakobsen, rútmuguitar og sang, og Jákup Jakobsen, bass, hava ikki verið við í eini 20 ár, men nú eru teir aftur á pallinum. Birgir Jakobsen leikar trummur.

Hans Christian Clementsen leikar vanliga sologuitar, men ikki lá fyri hjá honum at fara av landinum.

Tey av Kamarinum hava tí styrkt um bólkin. Árni Andreasen, solo- og steelguitar, og Jóan Petur Andreasen, keyboard, kenna vit úr Black Birds. Teir báðir fara á pall saman við Teimum á Kamarinum og soleiðis er styrkt um bólkin.

Tey av Kamarinum hava verið við síðani føroyska popp-søgan byrjaði. Tey eiga mangar av sangunum, ið standa ritaðir í minninum á mongum føroyingi.

Ein søguligur bólkur, sum nú finnur saman aftur í uppruna líki. Sostatt er lagt upp til eitt dansikvøld av teimum stóru í Sjónleikarhúsinum leygarkvøldið og seinni í Føroyahúsinum.

## Veðrið



**Fimmdagaforsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av landsynningi og eystri og stundum regn. Seinnapartin hvassur vindur ella skrið av útsynningi og ælingur. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Skrið ella stormur av útnyrðingi, seinnapartin snarar hann í landnyrðing. Ælingur, partvís kavi og hitin millum 1 og 4 stig. Um kvøldið hækkar hann upp í norðan og minkar vindin.




**Veðrið sunnudagin:**
Lítið lot av ymsum ættum, og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitin um frostmarkið.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fyrst stívt andøvsgul av suðri og regn. Seinni upp í hvassan vind av útsynningi og támut veður. Hitin kemur upp í 3 til 7 stig.




Lágtrýstið eystanfyri Ísland fer í landsynning eystan og dýpist.




Lágtrýstið vestanfyri Ísland fer eystureftir og dýpist nógv. Tað gevur væntandi storm við Føroyar leygardagin.




**Hitalagið mált frá 26./01. kl 06⁰⁰–27./01. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,0°C**
Minsti hiti máldur í jan.: **÷8,8°** Mesti hiti máldur í jan.: **11,6°**




Avfallið: 2,2 mm – **mált frá 26./01. kl 6⁰⁰–27./01. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í januar: 117,4 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷6 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | ÷9 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 4 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannahavn | 2 |
| Helsinki | ÷2 |
| Moskva | ÷12 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷1 |
| Bukarest | ÷6 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 4 |
| Róm | 5 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 5 |
| Malta | – |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 15 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 27 |
| Sydney | – |
| New York | – |
| Miami | 9 |
| Los Angeles | – |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

### Vestfalskyrrindi

21. januar: Fullmáni
28. januar: Seinna kvarter
1. februar: Mánin longst frá jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. jan. | 1127 | 2356 | 1027 | 2256 | 1042 | 2311 | 0100 | 1327 | 0200 | 1427 | 0942 | 2211 | 0842 | 2111 | 1142 | – | 0015 | 1242 | 1112 | 2341 | 0000 | 1227 |
| 29. jan. | – | 1228 | 1128 | – | 1143 | – | 0156 | 1428 | 0256 | 1528 | 1043 | 2318 | 0943 | 2218 | 0011 | 1243 | 0111 | 1343 | – | 1213 | 0056 | 1328 |
| 30. jan. | 0103 | 1336 | 0003 | 1236 | 0018 | 1251 | 0303 | 1536 | 0403 | 1636 | 1151 | – | 1051 | 2328 | 0118 | 1351 | 0218 | 1451 | 0048 | 1321 | 0203 | 1436 |
| 31. jan. | 0213 | 1445 | 0113 | 1345 | 0128 | 1400 | 0413 | 1645 | 0513 | 1745 | 0028 | 1300 | – | 1200 | 0228 | 1500 | 0328 | 1600 | 0158 | 1430 | 0313 | 1545 |

www.sosialurin.fo